

*Kongsdótturin sigraði við fleiri bátslongdum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Erla svam sum ein perla

**5-MANNAFØR KVINNUR**

## Kvinnurnar í Fuglafirði hava sett sjøtil á at vinna FM heitið, sum tær mistu á stokkinum í fjør

**Tróndur Arge**

Tað man vera sjáldan, at ein bátur vinnur so nógv, sum Erla Kongsdóttir við kvinnumanning vann í fjør, og at tað kortini ikki eydnast at vinna meistaraheitið. Í fjør vann Erla Kongsdóttir á Norðoyastevnu, og tilsaman vunnu kvinnurnar í Fuglafirði tríggjar róðrar. Men tær vóru kortini ov stuttar at vinna FM heitið. Tað vann Frúgvin í Miðvági, tí Frúgvin vann á Ólavsøku, og harvið stóðu tær í Fuglafirði við silvurmerkjum í bæði ólavsøkukappingini og FM kappingini.

Sjálvandi kendist tað sum vónbrot, og á Norðoyastevnu eydnaðist tað Erlu Kongsdóttir at taka fyrsta stigið fyri at vinna tað, sum kiksaði í fjør.

Sigurin í Klaksvík var sannførandi. Tvær bátslongdir var munurin millum tveir teir fremstu bátarnar, tá ið 5-mannaførini við kvinnum kappróðu. Erla Kongsdóttir og Drekin fingu besta startin, men tað var skjótt, at litti báturin leyp eina hálva bátslongd frá hvíta bátinum við drekastevninum, sum skjótt var leysur og meiri enn tað av hinum trimum.

Erla Kongsdóttir økti støðugt um munin, sum á Kósabrúnni var eina bátslongd og meiri enn tað, og á málinum var Erla Kongsdóttir tvær bátslongdir frammanfyri Drekan.

Kappingin um triðja plássið var tøtt, og ta kappingina vann Firvaldur av Tvøroyri eina bátslongd frammanfyri Blik av Argjum, sum var meiri enn tvær bátslongdir frammanfyri Havfrúnna úr Vestmanna. FM vinnarin í fjør, Frúgvin úr Miðvági, luttók ikki í kappingini.

**5 MANNAFØR** KVINNUR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Erla Kongsdóttir** | **05:35.13** |
| 2 | Drekin | 05:40.02 |
| 3 | Firvaldur | 05:50.13 |
| 4 | Blikur | 05:53.01 |
| 5 | Havfrúgvin | 06:01.22 |

# Sílið svam skjótast

**5-MANNAFØR GENTUR** Bara í eina løtu var kapping um fremsta plássið, og tað var als eingin kapping um næstfremsta plássið



*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tróndur Arge**

Sílið vardi á Norðoyastevnu heiðurin hjá Havnar Róðrarfelag. Elsta róðrarfelagið í høvuðsstaðnum hevur mangan staðið seg væl á Norðoyastevnu, og tað er komið fyri, at Havnar Róðrarfelag er farið úr Klaksvík við øllum sigrunum.

Soleiðis er tað ikki longur. Hesa ferð vann Havnar Róðrarfelag tveir róðrar. Annar var í dreingjaróðrinum í barnakappingini, og hin var kappróðurin millum gentumanningarnar.

Falkur úr Hósvík fekk besta startin, men tað var skjótt, at Sílið legði seg upp á síðuna av Falki. Hesir báðir bátarnir lógu væl frammanfyri allar hinar. Eina løtu stóð á jøvnum, men so fór Sílið at renna skjótari. Falkurin royndi at svara aftur, men á málinum var munurin meiri enn ein bátslongd. Hinir bátarnir vóru meiri enn fýra og kanska fimm bátslongdir aftanfyri.

**5 MANNAFØR** GENTUR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Sílið** | **05:42.22** |
| 2 | Falkur | 05:45.18 |
| 3 | Beinta | 05:57.11 |
| 4 | Silja | 05:59.23 |
| 5 | Fípan Fagra | 06:06.24 |
| 6 | Ørnin | 06:13.08 |
| 7 | Tambar | 06:15.11 |

# Argjadreingir stinnastir



*Blikur var bert stavnin frammanfyri Royndina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**5-MANNAFØR DREINGIR** Blikur tók við í ár, har dreingirnir av Argjum sleptu í fjør

**Tróndur Arge**

Á Ólavsøku í fjør varð FM heitið hjá dreingjunum á Tjaldrinum staðfest. Tjaldrið vann allar róðrarnar í fjør – uttan tann á Ólavsøku. Tá vóru tað argjadreingir umborð á Bliki, sum snýttu meistararnar og struku avstað við sigrinum.

Leygardagin legði Blikur við dreingjamanning fyri á sama hátt, sum árið í fjør varð endað. Orsaka av mjørkanum bíðaðu dreingirnir leingi eftir at sleppa avstað, men tá ið tað endiliga var so mikið klárt, at tað varð mett ráðiligt at starta, so fleyg Blikur avstað.

Argjadreingir løgdu seg á odda beinanvegin, og eingin skalaði teimum, hóast Royndin Fríða alla tíðina royndi at hanga í. Vágsdreingir vóru sera stinnir í endaspurtinum, og á málinum var munurin so lítil, sum tað bar honum til at vera, um talan ikki skuldi verða um umróður.

Unga manningin umborð á Jalli stóð seg lutfalsliga væl, og at úrslitið á Norðoyastevnu var, sum tað var, kann gott fara at vísa seg seinni í summar at vera grundarlag undir tættari og spennandi kapping.

**5 MANNAFØR** DREINGIR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Blikur** | **05:16.11** |
| 2 | Royndin Fríða | 05:16.12 |
| 3 | Jallurin | 05:20.17 |
| 4 | Teistin | 05:24.16 |
| 5 | Sílið | 05:25.23 |
| 6 | Svanur | 05:27.05 |
| 7 | Junkarin | 05:29.09 |
| 8 | Firvaldur | 05:31.07 |